## Ársúrslitið hálverað



Aðalfundur hevur verið í partafelagnum Føroya Tele, har ársroknskapurin fyri 2006 varð lagdur fram og góðkendur. Ársúrslitið varð 27,2 milliónir krónur eftir at 6 milliónir krónur eru settar av til skatt. Hetta er væl lægri enn í 2005, tá ið úrslitið varð 50,1 milliónir krónur. Ein av høvuðsorsøkunum til, at úrslitið er lægri, eru ikki afturvendandi kostnaðir áljóðandi 19,4 milliónir krónur. Talan er um niðurskriving av íløgum umframt 100 ára dagurin hjá Føroya Tele. Úrslitið verður mett at vera nøktandi, men felagið roknar við einum betri úrslitið í ár enn í 2006.

## Helvtin svarað nøgdsemiskanning

Í gjár fingu 500 fólk, ið enn ikki hava svarað spurnablaðnum í sjúkling anøgdsemiskanningin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum, sendandi eina áheitan um at svara skjótast gjørligt. 1000 fólk hava fingið sendandi spurnablað, har tey eru spurd um, hvussu tey høvdu upplivað tær veitingar og tænastur, tey fingu sum sjúklingar á føroysku sjúkrahúsunum. Kanningin er gjørd av óheftum donskum kanningarstovni, og skal vera grundarlag fyri at bøta um dygdina á tænastum, ið sjúkrahúsini veita sjúklingum. Tað er Sjúklingaráðið sum hevur heitt á landsstýrismaðurin um at taka stig til, at kanningar sum hesar verða gjørdar.

# Kunningarstova latin upp í Nólsoy

**Fyrrapartin í dag var móttøka í nýggju kunningarstovuni í Nólsoy, sum skal gerast miðdepililn fyri ferðavinnuvirkseminum í oynni**

FERÐAVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Bæði býráðið og ferðavinnan var væl umboðað, tá móttøka var í nýggju kunningarstovuni í Nólsoy fyrrapartin.

Kunningarstovan húsast í einum gomlum pakkhúsum frá 1887, sum upprunaliga varð bygt sum fiskahús, men seinni er nýtt til handil, ið var fyrsti av sínum slag í Nólsoy.

Roynt hevur verið at varðveita upprunaliga tilfarið, har tað hevur verið møguligt. Eitt nú er diskurin gjørdur av klædningaviði, sum framvegis var nýtiligur, eftir at klædningurin var skiftur út.

Arbeitt hevur verið í eina tíð við ætlanunum um at skapa grundarlag fyri eini munandi ferðavinnu í Nólsoy, og ein arbeiðsbólkur varð skipaður í fjør við hesum endamáli. Í vetur keypti Eirik Hansen, sum er limur í arbeiðsbólkinum Pakkhúsið hjá Petersen, sum tað vanliga verður rópt, og síðani hevur verið fingist við at umvæla tað og gera tað um til eina kunningarstovu.

Striltið hevur gingist við at fáa fatur á tilfarinum, og nú tíðin nærkaðist hevur verið arbeitt í »døgndrift« fyri at fáa hølini klár til móttøkuna í morgun. Og tað eydnaðist.

Vegna plásstrot mugu vit avmarka okkum, men meiri verður at frætta um ætlanirnar um Nólsoy sum ferðavinnumál í blaðnum í morgin.



*Nýggja kunningarstovan í Nólsoy heldur til í gamla Pakkhúsainum hjá Petersen. Pakkhúsið liggur sera væl fyri, tí hetta er tað fyrsta ið sæst, tá trinið verður á land av Rituni.*

*Mynd: Leo Poulsen*

# Johnny Deluxe á Ólavsøkukonsert

**Donsku popprokkararnir Johnny Deluxe, sum í fjør bjargaðu Summarfestivalinum við eini framúrskarandi náttarframførslu, fara aftur í ár vitja í Føroyum. Hesaferð er tað í Havn, á árligu Ólavsøkukonsertini, ið telur eitt annað útlendskt navn og fimm føroysk**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrireikararnir av Ólavsøkukonsertini fara í ár at halda seg tætt at konseptinum, sum hevur sermert landsins størsta rokk og poppkonsert í yvir 20 ár, nevniliga tónleikabólkar, sum venda sær til ungdómar millum 15 og 25 ár.



*Í fjør Johnny Deluxe spældu eina framúrskarandi konsert á Vágsbøi*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Konsertin er sum vant 27. juli, og í ár er hetta fríggjakvøld. Umframt Johnny Deluxe er konsertin pinnpakka við bestu Føroysku nøvnunum: Eyðun og Terji, Páll Finnur Páll, Sic, Boys In A Band og Side Effect. Harumframt kemur eitt útlendskt navn afturat. Endaligu samráðingarnar eru í gongd júst nú, og tað er næstan komið undir land við tí. Hvat hetta navnið er, verður kunngjørt 1. juli um avtalan kemur upp á pláss.

### Bjargaði Summarfestivalinum

Johnny Deluxe spældi tvær ferð í Føroyum í fjør, fyrsta framførslan var unplugged á Planet Awards, og var sømikið væl móttikin, at bólkurin var boðin á Summarfestivalin. Hetta var ein av bólkunum, ið var nógv seinkaður av mjørka í Vágum, ið tíanverri var við til at forstýra Summarfestivalin í fjør, men flest øll tyktuskt á einum máli um, at tá bólkurin endiliga kom á pallin klokkan 2.30 um náttina, var talan um bestu framførslu á festivalinum, og bæði Sosialurin og Dimmalætting søgdu, at hendan framførsla bjargaði festivalinum. Johnny Deluxe hevur skrivað eina ørgrynnu av megahittum. Fyrireikarnir siga, at tað hevur verið eitt stríð at fingið teir hendavegin, tí teir hava úr at gera, men at enda eydnaðist tað hóast alt. Stílurin Jonny Deluxe spælur, má sigast at vera reindyrkaður popptónleikur við løttum og vælskiljandi tekstum. Hetta ger, at tað er lætt at syngja við , og flest øll fara ivaleyst at syngja við, tá ið Jonny Deluxe fer at spæla tey mongu hittini á Ólavsøkukonsertini.

### Gott føroyskt

Men millum føroysku nøvnini eru eisini fleiri landaplágur, neyvan man nakar hava skrivað fleiri hitt enn duoin Eyðun og Terji, men ein annar bólkur, ið eisini hevur stórar syngi við kvalitetir eru Páll Finnur Páll, ið nærum hava tikið leiklutin sum teir nýggju Frændir, har allir áskoðararnir syngja við frá byrjan til enda. So eru hini trý føroysku nøvnini ikki líka syngið við vinarlig, men tey hava aðrar góðskur. Sic Boys In A Band og Side Effect hava tað til felags, at teirra tónleikur dugur at fáa mannfjøldir at flippa út, og tað hevur uttan iva eisini tað, sum hendir á Ólavsøkukonsertini.

### Atgongumerkini bíligari

Atgongumerkini eru at fáa til keyps í forsølu í øllum Kallhandlum, sum fara at selja tey fyrstu 500 atgongumerkini til Kallkundar fyri einans 150 krónur og øll kunnu gerast kallkundar Atgongumerkini fáast eisini til keyps í forsølu í Kunningarstovuni í Havn á 250 krónur og 300 krónur við dyrnar